| **Bólkur:**<br>Maskin | **Skeiðsnavn:**<br>Maskinlæra (Umhvørvi) | **Skeiðsnummar:**<br>330 – b |
|---|---|---|

| **Plaserað:** 6. lestrarhálvár | **Varir:** Eitt hálvár | **ECTS:** 6 (330 a+b) |
|---|---|---|
| **Støða:** Kravd lærugrein | **Gjørt:** 18-08-2005 | **Endurskoðað:** 27-11-2012 |

| | |
|---|---|
| **Endamál:** | Tann lesandi skal røkka eina grundleggjandi vitan um tey árin, sum avlopsog<br>dálkingarevni frá húsarhaldum, ídnaðarfyritøkum, orkuverkum, flútningsútgerð og skipum hava á umhvørvið, at hann verður førur fyri sjálvstøðugt at standa fyri rakstri og viðlíkahaldi av dálkandi anleggum og<br>reinsianleggum, so hesi verða rikin trygt og á búskaparliga dyggan hátt uttan vanda fyri umhvørvið. |
| **Høvuðsinnihald:** | Hava kunnleika til ringrásir og javnstøður í náttúruni.<br>Kunna skilja orsøkir til og avleiðingar av vatn- og luftdálking.<br>Hava kunnleika til mátar at reinsa dálkaða luft og vatn.<br>Kunna skilja uppbygnaðin, virkishátt og rakstur av tí organiska vatnreinsiog<br>slamviðgerðaranlegginum.<br>Skilja uppbygnaðin, virkishátt og rakstur av reinsianleggum til luft, útstoyts- og roykgass<br>Skilja grundleggjandi ljóðteori og ljóðútbreiðslu, herundir gera ljóðmátingar<br>og kunna sundurgreina og skilja mátiúrslitini, árin av og verju móti óljóði.<br>Kunnleika til lokalar, tjóðskaparligar og altjóða umhvørvisreglur. |
| **Undirvísingarháttur:** | Klassaundirvísing, uppgávurokning og starvsstovuroyndir í maskinlab. |
| **Kravdar fortreytir:** | Støddfrøði 2 (112)<br>Evnafrøði (131) |
| **Fortreytir góðar at hava:** | |
| **Evaluering:** | Munnlig próvtøka saman við moduli 330a.<br>Próvdøming eftir 7-trins stiganum við uttanhýsis próvdómara |
| **Vegleiðandi undirvísingartilfar:** | Jørgen Nielsen: Miljøteknik |
| **Viðmerkingar:** | Umhvørvi er ein partur av modulinum 330 sum eisini umfatar Maskinprojekt<br>6 tímar um vikuna eru til modulið. |
| **Ábyrgdari:** | NJ |